# reyða leyparan í Hollywood



hildið gjølla eyga við marknaðin, bæði her heima í Skandinavia og tann globala. Eyguni hava verið sera opin og eygleiðandi viðvíkjandi teim ymsu merkjunum innan smyrsl, húðrøkt og hárrøkt. Hetta hevur sjálvsagt sera stóran týdning, tí avbera týdningarmikið er at kenna marknaðin og alt tað, ið hann hevur at bjóða. Innan hetta yrkið er marknaðurin á tremur við merkjum og er í støðugari broyting. Tískil er altíð gott at vera eitt stig framman fyri kappingarneytan, sigur Hans Fróði. Framskygni er eitt "must".

– Sum nevnt áður havi eg veruliga kanna og lagt mær í geyma, alt ið viðkemur hesi verkætlan. Eg havi gjølla kannað umhvørvið og búskapin. Eg nýti fast uml. 1-3 tímar um dagin, har eg lesi alt, ið snýr seg um búskap, marknað og menniskjir at gerða. Eg eri handilsmaður um ein háls, og eg gleði meg nú tað er fari ígongd, sigur Hans Fróði.

### Nógv lið

– Konseptið er samansett av fleiri liðum. Bókin, ið vit eru í holt við, er bert ein av fáu liðunum. Nógvar spennandi verkætlanir eru farnar í gongd, og tað, ið drívur meg mest av øllum, eru øll produktini, ið vit eru í holt við at framleiða og sniðgeva.

Produktir til bæði kyn:
make-up (liðugt umleið januar 2007)
Styling produktir til hár
Shampoo (á gáttuni)
Húðrøkt til menn (liðugt umleið februar 2007)
Fashion Academy:
Skúlar í Íslandi,
Danmark og Amerika
áðrenn Vár 2007.

Vørurnar eru farnar til framleiðslu og skjótt klárar til marknaðin.

Vit hava eisini stórar ætlanir við skúlunum, ið vit í næstum fara undir í Íslandi, Danmark og USA. Hetta eru skúlar, ið næmingar sjálvir gjalda sámuligan kostnað fyri. Vit krevja onga serliga útbúgving fyri at luttaka á skúlanum, men brennur ein veruliga fyri hesum, er ongin forðing í at luttaka, sigur Hans Fróði.

### Framtíðin

– Sum støðan er nú flyta eg og konan yvir til USA. Eg komið at ferðast fast millum Florida, Ísland og L.A. Arbeiðið krevur nógva tíð og nógva ferðing.

– Í løtuni eri eg í holt við at velja røttu íleggjararnar. Hesir vera bæði stórir og lítlir íleggjarar, so eg kann ikki annað enn siga, at hetta sær bara heilt áhugavert út, sigur Hans Fróði.

*Hava Føroyar nakað at bjóða tær?*

– Ja, eg haldi, at tað er tørvur á einum stylisti her heima, men eg má ásanna, at marknaðurin er lítil, men eg havi heldur ikki haft nakrar dreymur um at arbeiða í Føroyum við tí.

– Eg vil fegin geva aftur til Føroyar av øllum tí, sum eg upplivi. Vónandi komi eg at kenna nógv týdningarmikil fólk, nú eg komi at starvast í USA. Eg kundi ímyndað mær, at læruríkt hevði verið, um eg kundi fingið onkran henda vegin at skipa fyri fyrilestrum og tílíkum. Alexis Vogel kennir nógv handilsfólk, ið óivað kundu lært okkum eitthvørt. Kundi hugsast, at mítt gjøgnumbrot innan hesa vinnu kann gerast ein liður í marknaðarføringini av Føroyum í útheimi.

– At enda sigur Hans Fróði Hansen seg vera sera spentan og vónríkan viðvíkjandi slóðbrótandi verkætlan síni. Hetta er næstan dreymakent, men veruligt tekur hann til við einum brosi.

Tað, ið mong av okkum bert droyma um, er nú veruleiki fyri Hans Fróða Hansen. Hans Fróði hevur veruliga eyðmerkt seg uttanlands. Hann hevur ikki bert opna dyrnar fyri sjálvum sær, men Føroyar, heimstaður hansara, fær vónandi eisini gagn av hesi sannroynd.

Sigast kann bert stórt tillukku til Hans Fróða og alla eydnu í framtíðini. " Um tú veruliga brennur fyri tí, sum tú tekst við og hvílur í sjálvum tær, ber alt til", endar Hans Fróði Hansen hugnaligu og ævintýrkendu samrøðu okkara við, og vit veittra hvør øðrum farvæl. Í mínum huga er bert tankin um, at eg júst havi tosa við eina komandi stjørnu.



*Kendi rapparin Snoop Dog og Hans Fróði Hansen vóru í ball saman*

## Heimskenda make-up guru'in

Alexis Vogel er mitt í 40'unum og býr í L.A.

Alexis Vogel er sædd sum ein sonn "guru" í amerikanska make-up heiminum og hon er tann, ið stjørnurnar helst vilja hava hendur á. Mong vilja vera við, at Alexis Vogel er tann besta innan yrki sítt. Vakurleikadrotningar sum Carmen Elektra, Bo Derek og Paula Abdul siga øll í ein munn "Tað er ongin sum Alexis".

Tey seinastu 22 árini hevur Alexis Vogel arbeitt við make-up fyri sjónvarpsrásir, filmar, tónleikasjónbond, lýsingar, bløð o.a. Hon hevur arbeitt saman við mongum stórum stjørnum og kendum fólki. Alt frá supermodellum til tann kendasta og kendastu filmstjørnuna, ið fella okkum í hug.

Alexis hevur ikki bert tikið sær av make-up. Hár hevur hon eisini fingist nógv við, og rósandi orð eru bert at finna á tí økinum. Hon er ein sterk kvinna innan yrki sítt, hon er bæði make-up artist og hár stylist. Hetta gevur henni eina stóra styrki, ið er høgt í metum í Hollywood.

»Hon hevur hendurnar á einum eingli«, siga tey, ið hava verið eydnusom og vorðin smurd av Alexis. Harper's Bazaar blaðið hevur kosið Alexis Vogel at vera tíðarinnar Svangali.

Her eru bert fáir av hennara mongu kendu kundum:

Paula Abdul
Brian Adams
Pamela Andersen
Caprice
Jim Carey
Kelly Clarkson
Ellen Degeneres
Carmen Elektra
Vanessa Williams
Shannon Elizabeth
Linda Evangelista
Fabio
Brandy
Hugh Hefner
Richard Branson
Kid Rock
LaToya Jackson
JORDAN
Melania Knauss Trump
Simon Cowell
KISS – tónleikabólkurin
Avril Lavigne
Tommy Lee
Jay Leno
Paris Hilton
Black Eye Pee
Gwen Stefani
Janet Jackson
Nancy Sinatra
Steven Tyler og mong onnur.

Bløð, ið Alexis Vogel arbeiðir fyri:

Cosmopolitan
Elle
Entertainment Weekly
Fitness
Foto
GQ
HELLO
In Style
Playboy
SKy
Stern
Men´s Health
Sun – London
T.V. Guide
Vogue – USA
Vogur – German
Vogue – French
Vogue – Italian og mong onnur.